## Eingin stjórn

Fyri hálvum triðja mánað síðani var tjóðartingsval í Belgia, men enn hevur landið ikki fingið nýggja stjórn. Teir kristiligu demokratarnir vunnu valið tann 10. juni, men formaður teirra, Yves Leterme, noyddist í gjár at boða Albert kongi frá, at hann fær ikki meiriluta fyri einari nýggjari stjórn. Ein orsøk er, at teir kristiligu demokratarnir eru úr tí flamska partinum av Belgia. Teir krevja størri sjálvræði, men tað vil tann franski parturin ikki góðtaka. Nú skal kongur so tilnevna ein annan samráðingarleiðara.



## Hizbollah háðar Ísrael

Fyri einum ári síðani vóru harðir bardagar ímillum ísraelska herin og hermenn hjá rørsluni Hizbollah í Libanon. Bardagarnir vardu 34 samdøgur, og hesar dagarnar sendi Hizbollah 4000 rakettir inn í Ísrael, sum bumbaði Libanon afturfyri. Nú skipar Hizaballah fyri einari framsýning frá bardøgunum. Framsýningin er á einum savni beint sunnan fyri Beirut, og Hizbollah dylur ikki fyri, at eftir hennara tykki vann rørslan bardagarnar ímóti Ísrael. Tí verða ísraelsku hermenninir háðaðir, og tað ber til at keypa videospøl, har tað ber til at skjóta ísraelskar hermenn og stríðsvognar.

# Arbeiðsmegi er í Føroyum

**Tað er hópurin av pensjónistum og fyritíðarpensjónistum, sum fegnir høvdu tikið hond í á arbeiðsmarknaðinum, men skipanin forðar fyri hesum. Og tað er óskiljandi í einum landi, sum skríggjar eftir arbeiðsmegi, sigur Jørgen Niclasen**

ARBEIÐSMEGI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Vit áttu at eggja pensjónistum og fyritíðarpensjónistum at hjálpt til á arbeiðsmarknaðinum, heldur enn at revsa tey, heldur Jørgen Niclasen*

Arbeiðsmarknaðurin skríggjar eftir fólki. Arbeiðsloysið er søguliga lágt, og fyritøkur fáa ikki framleitt tað, tær ynskja.

Eitt uppskot er á veg í tingið um at gera tað lagaligari hjá ES-borgarum at koma til Føroya at arbeiða, men hetta kemur ikki í gildi fyrr enn í fyrsta lagi 1. januar 2008. Samstundis hava vit eina skipan, sum beinleiðis forðar eitt nú pensjónistum og fyritíðarpensjónistum at taka eina hond í á arbeiðsmarknaðinum.

- Fyri hesar báðar bólkar er galdandi, at tá inntøka við síðuna av pensjónini kemur upp á eitt vist, verður inntøkan mótroknað í pensjónini við 60 krónum av hvørjum 100, ið forvunnin verður. Tá skattur samstundis skal gjaldast av hesari inntøkuni er ikki ringt at rokna út, at bæði pensjónistar og fyritíðarpensjónistar arbeiða fyri onga løn, sigur Jørgen Niclasen.

Formaður Fólkafloksins vísir á, at tað finnast nógv fólk, sum fegin høvdu vilja tikið hond í á arbeiðsmarknaðinum, men stutt sagt ikki eru motiverað til hettta, tí tey, sum skipanin er í dag, noyðast at arbeiða fyri einki.

- Tí er tað gleðiligt, at samgongan nú hevur tikið stig til, at broyta skipanina soleiðis, at mótrokningsprosentið verður sett úr 60 niður í 30. Og spurningurin er, um vit ikki áttu at sett hetta enn longur niður, sigur Jørgen Niclasen.

### Botnfrádrátt

Formaður Fólkafloksins sigur, at tað er ein undarlig skipan, sum forðar fólki í at fara út á arbeiðsmarknaðin, serliga í einum landi, sum skríggjar eftir arbeiðsmegi.

- At ein er vorðin pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur merkir ikki, at ein ikki kann vera úti á arbeiðsmarknaðinum. Tað ber sakstans til hjá hesum at arbeiða niðursetta tíð, og tí hevði ein eggjandi skipan fyri hesi hjálpt til at nøkta tørvin á arbeiðsmarknaðinum. Eg sigi ikki, at hetta hevði verið nokk, men tað hevði verið ein hjálp, sigur Jørgen Niclasen.

Eitt annað, sum forðar fyri, at pensjónistar fara út á arbeiðsmarknaðin er, at teir verða skattaðir beinanvegin. Teir eru tí verri fyri í so máta enn restin av føroyingum, sum fáa ein botnfrádrátt upp á 25.000 krónur.

- Hevði hetta verið galdandi fyri hesar samfelagsbólkar eisini, høvdu teir sæð eina meining í at tikið eina hond í við egning til dømis ella annað arbeiði, sum pensjónistar ella fyritíðarpensjónistar lættliga megna, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur tað verða í so snævurskygt bert at fokusera upp á fremmanda arbeiðsmegi og heilt gloyma tað potentionellu arbeiðsmegi, sum er í landinum.

- Heldur enn at revsa áttu vit at eggja fólki til, at taka hond í á arbeiðsmarknaðinum. Og tað er nógvastaðni, at hesi fólk høvdu gjørt ein mun, sigur Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins.

# Vinnan skapar úrslitið

**Góða hálvársúrslitið hjá SEV stavar frá meirnýtslu av streymi í vinnuni, og serliga í alivinnuni**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

SEV boðaði í tíðindaskrivi í gjár frá, at felagið hevði eitt óvæntað stórt avlop í hálvársroknskapinum. Heilar 25,4 milliónir krónur vóru í rakstraravlopi fyrra hálvár, og tað er munandi meiri enn mett varð.

Høvuðsorsøkin til góða úrslitið er, at nýtslan er vaksin nógv fyrra hálvár í ár, meiri enn tvífalt tað, sum roknað var við í fíggjarætlanini.

Stóri vøksturin stavar frá vinnuni, fyrst og fremst alivinnuni. Sjálvandi er komin nøkur húsarhald aftrat, men tað munar einki í tí samlaða vøkstrinum, sigur Klæmint Weihe.

Hetta heldur hann er greitt tekin um, at tað gongur við rúkandi ferð í føroyska samfelagnum.

Ein onnur orsøk til góða úrslitið er, at rakstrarútreiðslurnar higartil í ár hava verið væl lægri enn væntað í fíggjarætlanini fyri 2007.

Vøksturin í elnýtsluni fyrra hálvár 2007 hevur verið 6,1 prosent, og um hendan gongdin heldur fram, verður vøksturin í elnýtsluni við ársenda umleið 8,1 prosent.

- Góða úrslitið gevur helst SEV møguleikan at endurskoða prísásetingina í heyst, og stýrið fer í næstum at taka spurningin upp í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2008, sigur Leivur Hansen, stýrisformaður.

Uppskot um fíggjarætlan fyri 2008 verður lagt fyri umboðsnevndina í november. Elprísirnir hava verið óbroyttir seinastu sjey árini.



*Tað er týðiliga alivinnan, sum stendur fyri stóra vøkstrinum í streymnýtsluni fyrra hálvár í ár*